Fíggjarmálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	8. desembur 2020
Mál nr.:	20/00335
Málsviðgjørt:	AE
Eftirkannað:	24.november 2020

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tunlar norður um Fjall við tilhoyrandi vegum
(Hækka játtanarkarmin frá 252 mió. kr. til 522 mió. kr.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 58 frá 25. mai 2009 um tunlar norður um Fjall við tilhoyrandi vegum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, stk. 2 verður "252 mió. kr." broytt til: "522 mió. kr."

2. Í § 2 verður aftan á "hon er kunngjørd" sett: "og fer úr gildi 31. desember 2027".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Eftir §1, stk. 2 í løgtingslóg nr. 58 frá 25. mai 2009 um tunlar norður um Fjall við tilhoyrandi vegum, er ásett at byggiútreiðslurnar í mesta lagi kunnu verða 252 mió. kr.

Orsøkin til lógaruppskotið um at broyta verklagslógina er at fáa heimild til at hækka játtanarkarmin til verkætlanina til 522 mió. kr., sum svarar til eina dagførda kostnaðarmeting, íroknað væntaðar príshækkingar, sum verða eini 35 mió. kr.

Sostatt kann landsstýrismaðurin gera bindandi avtalur yvir fíggjarár fyri alla verkætlanina og fara undir at gera tunlar norður um Fjall, við tilhoyrandi vegagerð.

Eisini verður ásett nær lógin fer úr gildi.

1.2. Galdandi lóggáva

Tunlarnir norður um eru Fjall lótu upp ávíkavist í 1965 og 1967 og eru sostatt næst elstu tunlar í Føroyum. Teir eru ótíðarhóskandi og lúka ikki dagsins krøv. Tað er neyðugt at gera nýggjar tunlar, sum lúka øll nútíðar krøv, borgarum og vinnu til gagns.

Tunlarnir hava bert eina koyribreyt, sum er 3,5 metrar breið, og eru tunlarnir bert 3,2 metrar høgir. Nýggju tunlarnir hava 2 koyribreytir, sum eru 3,25 metrar hvør, samanlagt 6,5 metrar, og vegøksl uppá 1 metur hvørjumegin koyribreytina. Talan er um tunlar við profilinum T8,5, sum er tað sama sum Viðareiðistunnilin.

Árnfjarðatunnilin (tunnilsmunnin) er á 50 metra hædd frá Ánunum, og 60 metra hædd í Árnafirði. Hvannasundstunnilin, (tunnilsmunnin) er á 60 metra hædd í Árnafirði og 70 metra hædd Hvannasundsmegin.

Tað koyra umleið 2.000 akfør (gjøgnumkoyringar samanlagt) í miðal um samdøgrið ígjøgnum tunlarnar hvønn gerandisdag, og verður roknað við at ferðslan fer at økjast.

Verklagslóg um tunlar norður um Fjall varð samtykt í 2009, og var verkætlanin klár at bjóða út í 2010, men er verkætlanin ikki framd, tí neyðugur peningur hevur ikki verið játtaður.

Eftir galdandi løgtingslóg um tunlar norður um Fjall verður nýggjur tunnil gjørdur millum Ánirnar og Árnafjørð á leið har, sum verandi tunnil er, og nýggjur tunnil verður gjørdur millum Árnafjørð og Norðtoftir á leið har, sum verandi tunnil er. Harumframt verða vegir gjørdir millum nýggju tunlarnar, og knýtt verður í verandi landsvegir. Árnafjarðartunnilin er prosjekteraður til at verða 1,9 km. og Hvannasundstunnilin 2,2 km. Tað skulu gerast 1,9 km. av nýggjum vegi. Sí kort yvir linjuføring.

Landsverk mælir framvegis til somu loysn, sum er ásett í verklagslógini frá 2009, og er tað eisini ætlan landsstýrisins. Lógarbroytingin sjálv snýr seg sostatt um at hækka játtanarkarmin.

Verkætlanin er liðugt dagførd í ár. Landsverk bjóðaði áhugaðum arbeiðstakarum at søkja um undangóðkenning til at geva tilboð upp á høvuðsarbeiðstøku. Undangóðkenningin er liðug, og hava 4 feløg bjóðað seg fram. Høvuðsarbeiðstøkan er klár at bjóða út, har 3 av hesum feløgum eru boðin til at geva prís uppá arbeiðið.

Farið verður undir at gera arbeiðsvegir í ár, og verður farið undir byggiarbeiðið av álvara í 2021.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at hækka játtanarkarmin í verklagslógini um tunlar norður um Fjall við tilhoyrandi vegum, soleiðis at byggiútreiðslurnar samsvara við dagførdu kostnaðarmetingina.

Tað er ein fyritreyt fyri at kunna fara undir verkætlanina, at játtanarkarmurin er í lagi, soleiðis at landsstýrismaðurin kann gera fíggjarliga bindandi avtalur fyri alla verkætlanina um tunlar norður um Fjall.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Einasta broyting er at hækka játtanarkarmin í galdandi verklagslóg, og at áseta nær lógin fer úr gildi.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur ikki verið til ummælis, men er gjørt í samstarvi við Landsverk.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Landið

Í galdandi lóg um tunlar norður um Fjall er játtanarkarmurin 252 mió. kr. Við lógarbroytingini verður játtanarkarmurin hækkaður til 522 mió. kr., íroknað prís- og lønarvøkstur uppá 35 mió. kr. í byggitíðini.

Játtanir og ætlan

Í tíðarskeiðinum 2009 – 2011 vóru 3 mió. kr. brúktar samanlagt til tunlarnar Norður um Fjall, og vóru 670 tús. kr. brúktar til fyrireikingar í 2019. Í 2020 eru 15 mió. kr. játtaðar, og verður nýtslan mett til umleið 5 mió. kr. Sostatt verða 10 mió. kr. fluttar fram til 2021.

Karmurin í verklagslógini fevnir um nýtslu og játtanir í tíðarskeiðinum 2020 – 2024. Verklagslógin gevur landsstýrismanninum heimild til at gera bindandi avtalur yvir ár fyri alla verkætlanina. Roknað verður við at byggitíðin verður 4 ár.

Eftir langtíðarløguætlan landsstýrisins, verða samanlagt 500 mió kr. játtaðar til at gera farleiðina í tíðarskeiðinum 2020 – 2024. Í 2020 eru 15 mió. kr. játtaðar. Í 2021 verða eftir ætlan 100 mió. kr. játtaðar. Í 2022 verða eisini 100 mió. kr. játtaðar. Í 2023 verða 135 mió. kr. játtaðar, og í 2024 verða 150 mió. kr. játtaðar eftir ætlan.

Landsverk, kostnaðarmeting

Eftir dagførdari kostnaðarmeting hjá Landsverki, kostar verkætlanin samanlagt 522 mió. kr. Kostnaðarmetingin er millum annað gjørd við støðið í kostnaðinum av Hvalbiartunlinum. Kostnaðarstøðið av verklagsarbeiði er hækkað nógv seinnu árini.

Tunlar norður um Fjall, kostnaðarmeting

	2020	2021	2022	2023	2024	Íalt
1. Høvuðsarbeiðstøka (HVÚ)	**3.000**	**80.500**	**122.500**	**118.500**	**75.500**	**400.000**
Tunlar. Bora, spreingja, tryggja fjallið o.a	0	70.500	107.500	78.500	3.500	260.000
Tunlar. Vegir o.a.	0	0	3.000	5.000	32.000	40.000
Portalar	0	0	0	15.000	5.000	20.000
El-arbeiði	0	0	0	15.000	25.000	40.000
Vegagerð til tunlarnar	3.000	10.000	12.000	5.000	10.000	40.000
2. Meira og minniveiting, eykaarbeiði	0	**7.000**	**10.000**	**10.000**	**10.000**	**37.000**
3. Prísvøkstur og lønarvøkstur	0	**3.000**	**8.000**	**12.000**	**12.000**	**35.000**
4. Prosjekteringsútreiðslur	**5.000**	0	0	0	0	**5.000**
5. Byggileiðsla, verklagsleiðsla , fakeftirlit	**1.000**	**3.500**	**3.500**	**3.500**	**3.500**	**15.000**
6. Málsettar útreiðslur, ymisk	**6.000**	**6.000**	**6.000**	**6.000**	**6.000**	**30.000**
Samlaður kostnaður	**15.000**	**100.000**	**150.000**	**150.000**	**107.000**	**522.000**

Høvuðsarbeiðstøkan verður mett til at kosta einar 400 mió. kr. Tað er byggikostnaðurin fyri vegir og tunlar, el- arbeiði og annað. Harumframt verða "meira- og minniveiting og eykaarbeiði", mett til at kosta 37 mió. kr.

Prísvøkstur og lønarvøkstur verður mettur til at verða 35 mió. kr. í byggitíðini. Prosjekteringsútreiðslur verða umleið 5 mió. kr. Byggileiðsla, verklagsleiðsla og fakeftirlit kostar einar 15 mió. kr. Málsettar útreiðslur verða mettar til 30 mió. kr. Tað eru ymiskar útreiðslur til dømis lendiskeyp, tryggingar, ferðaútreiðslur og nógv annað.

Játtanirnar til farleiðina norður um Fjall eiga at fylgja byggitilgongdini, og hevur Landsverk eisini mett, hvussu útreiðslurnar falla yvir fíggjarár í kostnaðarmetingini.

Játtanin í 2020 er sum tilskilað 15 mió. kr. Landsverk roknar við at 100 mió. kr. verða brúktar í 2021. Í 2022 verða 150 mió. kr. brúktar. Í 2023 somuleiðis 150 mió. kr., og í 2024 verða 107 mió. kr. brúktar. Samanlagt 522 mió. kr.

Tað kann sostatt gerast neyðugt at tillaga langtíðarløguætlan landsstýrissins samsvarandi.

Rakstur og hald av nýggju farleiðini fer at kosta umleið 3,3 mió. kr. árliga. Samstundis minka útreiðslurnar til verandi farleið.

Ikki fyrr enn verkætlanin er boðin út, tilboðini komin inn, og samráðingar hava verið við arbeiðstakara um sáttmála, kenna vit verkætlanarkostnaðin. Tað kunnu eisini koma støður í byggitilgongdini, sum ávirka kostnaðin.

Eftir galdandi løguætlan landsstýrisins, og ætlan Landsverks byrjar sjálvt byggiarbeiðið at gera tunlarnar norður um Fjall í 2021 og verður farleiðin eftir ætlan liðug í 2024. Talan verður um eina góða farleið, sum lýkur øll nýmótans krøv, øllum samfelagnum til gagns.

Kommunur
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Landsverk fyrisitur landsvegirnar, og hevur tað umsitingarligar avleiðingar fyri stovnin at fyrireika verkætlanina, at bjóða arbeiðið út og at hava eftirlit við verkætlanini. Landsverk stendur fyri rakstri og viðlíkahaldi. Tá verkætlanin er framd, verður minni umsiting av gomlu farleiðini.

Verkætlanin hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri byggifeløg og onnur, sum fremja verkætlanina. Umstøðurnar fyri vinnulívið batna eisini munandi, tí allur flutningur verður høgligari.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Vegagerð broytir náttúruna, har vegur verður gjørdur. Dentur verður lagdur á tað fagurfrøðiliga, og at hampað verður fram við landsvegum.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur stóran týdning fyri økið norðan fyri tunlarnar.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóða sáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið elvir ikki til revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið ásetur ikki skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið ásetur ikki gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at gera fíggjarliga bindandi avtalur yvir fíggjarár til at gera nýggja farleið norður um Fjall.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingar av uppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Ja	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Nei	Ja	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1, nr. 1
Í § 1 verður heimilað landsstýrismanninum at hækka samlaðu útreiðslurnar til verkætlanina um tunlar norður um Fjall við tilhoyrandi vegum til 522 mió. kr.

Við í hesum eru allar útreiðslur til verkætlanina, allar fyrireikingar, byggipláss, vegagerð, tunnilsgerð og annað í tíðarskeiðinum 2020 – 2024.

Til § 1, nr. 2
Broytt verður nær høvuðslógin fer úr gildi. Í løtuni hevur høvuðslógin onga sólseturáseting, sum verklagslógir skulu hava. Eftir ætlan verður øll verkætlanin liðug í 2024. Skotið verður upp, at høvuðslógin fer úr gildi 31. desember 2027 fyri at taka hædd fyri møguligum seinkingum, sum kunnu koma fyri í byggiverkætlanum.

Til § 2
Ásetir nær henda løgtingslóg kemur í gildi.

Fíggjarmálaráðið, 8. desembur 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Linjuføring, tunlar norður um Fjall